UTTAN ÚR HEIMI



*Ísraelski trygdarovastin ávaraði stjórnina ímóti at beina fyri Ahmed Yassin. Tað var betur ógjørt, helt hann*

*Mynd: Reuters*

# Ávaraði ímóti at drepa Yassin

**Ovastin í ísraelsku trygdartænastuni, Avi Dichter, ávaraði stjórnina ímóti at geva herinum boð um at beina fyri Hamas-leiðaranum Ahmed Yassin**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var á einum fundi í síðstu viku, at tað serliga trygdarráðið hjá ísraelsku stjórnini umrøddi eina ætlan um at beina fyri Ahmed Yassin. Á fundinum vóru millum annað Ariel Sharon, forsætisráðharri, og ovastin í trygdartænastuni, Avi Dichter.

Ísraelska blaðið Haaretz skrivaði í gjár, at Avi Dichter mælti Sharon og hinum limunum í trygdarráðnum frá at lata herin beina fyri Hamas-leiðaranum. Ovastin í trygdartænastuni segði seg stúra fyri, at ein slík avrætting fór at elva til so nógvan ófrið, at tað var betur ógjørt. Hann væntaði eisini, at avrættingin fór at styrkja Hamas.

Men trygdarráðið valdi kortini at geva herinum boð um at beina fyri Hamas-leiðaranum.

Fleiri útlendskir eygleiðarar vænta, at Avi Dichter fær rætt. Yvirgangsserfrøðingurin Magnus Ranstorp, sum arbeiðir á St. Andrewa University, segði í gjár, at morðið á Ahmed Yassin kann savna allar palestinar í bardaganum ímóti Ísrael. Tað sama sigur Azzam al-Tamimi á arabiska stovninum í London. Hann væntar, at Hamas fer at fáa nógvar nýggjar limir nú.

# Bush oyðilegði bardagan ímóti yvirgangi

**Fyrrverandi ráðgevin hjá George W. Bush, forseta, Richard A. Clarke, vil vera við, at forsetin longu dagin eftir atsóknina tann 11. september í 2001 vildi sleppa at leypa á Irak.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Vit vóru ógvuliga fá eftir í forsetabústaðnum tann 12. september, tí tey flestu starvsfólkini vórðu flutt haðani eftir atsóknina dagin fyri. Tá forsetin fekk eygað á meg, bað hann nakrar av ráðgevunum koma inn í eitt høli.

- Tit mugu kanna alt eina ferð afturat. Alt. Tit mugu kanna, um Saddam skipaði fyri hesum, segði Bush sambært Richard A. Clarke.

- Men, harra forseti. Tað var al-Qaeda, svaraði Clarke.

- Eg veit, eg veit, men... men kannið, um Saddam var uppií. Kannið tað. Eg vil hava alt at vita. Kannið Saddam, svaraði forsetin og fór úr fundarhølinum.

Eisini Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, helt sambært Clarke, at USA átti at leypa á Irak.

- Í Afghanistan er einki mál at bumba. Lat okkum heldur bumba Irak, segði Rumsfeld.

Soleiðis skrivar Richard A. Clarke í einari bók, sum kom út mánadagin. Hann var ein tann týdningarmesi ráðgevin hjá Bush, forseta, til hann fór frá fyri einum ári síðani. Frammanundan hevði hann verið ráðgevi hjá eitt nú Ronald Reagan og George Bush, eldra.



*Richard A. Clarke skrivar í nýggjari bók, at Saddam Hussein var tað einasta, sum mól í høvdinum á George W. Bush, forseta. Hann vildi sleppa at leypa á Irak*

*Mynd: Reuters*

Í bókini skrivar Clarke, at Bush fekk fleiri ávaringar um al-Qaeda tíðliga í 2001, men at forsetin lat ikki við seg koma. Tað var bara Saddam Hussein, sum mól í høvdinum á forsetanum, og úrslitið síggja vit nú, skrivar Clarke, sum vil vera við, at við álopinum á Irak oyðilegði Bush bardagan ímóti yvirgangi.

- Úrslitið er, at forsetin hevur givið øllum teimum mest víðgongdu islamsku kreftunum um allan heimin vind í seglini, skrivar Richard A. Clarke.

Embætisfólk hjá Bush, forseta vísa atfinningunum hjá fyrrverandi ráðgevanum aftur. Trygdarpolitiski ráðgevin, Condollezza Rice, skrivaði í einari grein í Washington Post í gjár, at Richard A. Clarke veit ikki, hvat hann skrivar um, tí hann var ikki hjástaddur, tá tær týdningarmestu avgerðirnar vórðu tiknar.

Talsmaður forsetans, Scott McClellan, undraðist á, hví Clarke hevur bíðað so leingi við bókini. Hann heldur, at endamálið er at skaða umdømi forsetans upp undir forsetavalið í heyst.

Eftir stendur, at Clarke varð ein nógv avhildin forsetaráðgevi, og at hann varð biðin um at halda fram í starvinum, tá hann segði upp fy ri einum ári síðani.

# Gjørdi rætt

**Fráfarandi spanski forsætisráðharrin, José María Aznar, iðrar seg ikki um, at hann styðjaði USA í krígnum við Irak.**

KRÍGSSTUÐUL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 14. mars tapti tann konservativi flokkurin tjóðartingsvalið í Spania, og tí noyðist José María Aznar at leggja frá sær sum forsætisráðharri.

Eftir valið eru nógvir eygleiðarar komnir til ta niðurstøðu, at tað var tann treytaleysi spanski stuðulin til amerikanska álopið á Irak, sum feldi stjórnina, og at stuðulin var ein av orsøkunum til ta blóðugu atsóknina í Madrid, sum kostaði 202 mannalív.

Men José María Aznar iðrar seg ikki um avgerðina at stuðla USA.

- Eg eri stoltur av tí, sum eg gjørdi. Sjálvandi harmist eg tað, sum hendi í Madrid, men mín samvitska er rein, segði Aznar í samrøðu við sjónvarpið Telecinco fyrrakvøldið. Hann legði afturat, at eftir hansara tykki er heimurin tryggari at liva í, nú Saddam Hussein er rikin frá.

- Tí var eg til reiðar at stuðla krígnum. Vit gjørdu tað, sum var neyðugt, segði Aznar. Hann duldi ikki fyri, at hann heldur avgerðina hjá eftirmanni sínum at taka teir 1.300 sponsku hermenninar úr Irak vera eitt mistak.

ítróttur

Nr. 58 • mikudagur • 24. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# HB tikið kvinnuliðið úr kappingini

**Havnar Bóltfelag hevur tikið kvinnuliðið hjá sær úr landskappingi 2004, og hetta er fyrstu ferð, síðani at kvinnufótbólturin byrjaði í 1984, at HB einki kvinnulið hevur**

KVINNUFÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í nógv ár myndaði HB oddin í føroyskum kvinnufótbólti, men hetta er nú farið í søguna. Í gjár sendi Havnar Bóltfelag eitt skriv til kappingarnevndina hjá FSF, har boðað var frá, at HB tók sítt kvinnulið úr kappingini í ár.

## Alt ov lítið av fólki

Á heimasíðuni hjá Havnar Bóltfelag, www.hb.fo, verður skrivað til kappingarnevndina endurgivið. Skrivið ljóðar soleiðis: Við hesum skrivi verður boðið frá, at vegna manningartrot mugu vit tíverri taka kvinnulið okkara - 1. deild kvinnur - úr kappingini. Nógvar royndir hava verið gjørdar at skava nokk av fólki saman, men alt til fánýtis, og als einki røkist fyri, at fleiri leikarar fara at koma til felagið. Sum er hava vit bert 4(!) vaksnar leikarar, meðan restin eru gentur 14-17 ár. Hetta er als ikki nóg gott ella haldbart grundarlag til eitt 1. deildarlið. Tískil hava vit valt at taka hesa tungu avgerðina longu nú fyri at órógva komandi kvinnukappingina minst møguligt. Vit harmast støðuna almikið, men duga ikki at síggja aðra loysn.

Hetta er fyrstu ferð, síðani at kvinnufótbólturin í Føroyum byrjaði í 1984, at HB ikki hevur eitt kvinnulið, og lítið man verða at ivast í, at tað er ein beiskur biti hjá havnarfelagnum at svølgja í sínum 100-ára jubileumsári.



*Kanska besti kvinnuliga fótbóltsspælarin í Føroyum nakrantíð, Helga Ellingsgaard, var í nógv ár drívmegin á kvinnuliðnum hjá HB, sum nú fyribils er farið í søguna*

*savnsmynd*

# Hattrick til Anniku

TÍÐINDASKRIV

Bogaskjótifelagið Tambar skipaði fyri seinastu innandura kapping fyri veturin, tá tey ungu leygardagin skutu um føroyameistaraheitið á 15 metrum.

Í bólkinum compound var sera javnt millum tríggjar teir fremstu, tá komið var til steðgin. Tað vóru bert tvey stig millum nummar eitt og trý.

Seinna umfar var spennandi alla tíðina, tí tað var áhaldandi sera javnt.

Endaliga støðan í compound bólkinum var: Føroyameistari Eyðfinn Poulsen við (275+279) 554 stigum, nr. 2 Kristoffer Andreasen við (274+278) 552 stigum, nr. 3 Kaj Johannesen við (273+269) 542 stigum og nr. 4 Súnfríður Jacobsen við (264+276) 540 stigum, allir úr Ørvi.

Í bólkinum recurve løgdu Annika Vang og Eirikur í Jákupsstovu seg sum so ofta fremst. Her var eisini sera javnt. Eirikur førdi við tveimum stigum, tá komið var til steðgin. Nr. 3 var um 30 stig aftanfyri tey.

Seinna umfar var eisini sera javnt og var ikki sørt merkt av spenningi. Hesin spenningur ávirkaði tey nógv og gekk bæði upp og niður, so tey skiftu nakrar ferðir um at vera fremst.

Endaliga úrslitið í recurve bólkinum var: Føroyameistari Annika Vang við (284+277) 561 stigum, nr. 2 Eirikur í Jákupsstovu við (286+272) 558 stigum, bæði úr Ørvi. Nr. 3 Rói Christiansen við (252+238) 490 stigum og nr. 4 Jastrid M. Jensen, sum var beint aftanfyri við tveimum stigum færri.

Í compound bólkinum vóru 4 luttakarar og í recurve bólkinum 20 luttakarar.



*Ársins bogaskjútti í recurve, Annika Vang, við heiðursmerkjunum, sum gav henni hattrick*

## Ársins skjúttar

Í compound bólkinum var trupult at velja, hvørt Eyðfinn Poulsen ella Kaj Johannesen skuldu fáa heiðurin at vera ársins skjútti 2004.

Teir hava báðir verið sera javnir allan veturin, hava skiftst um at vinna kappingar, hava ment seg nógv og sett fleiri persónlig met. Tað, sum gjørdi munin, var at Eyðfinn vann eina FM-kapping.

Ársins skjútti í compoundbólkinum bleiv sostatt Eyðfinn Poulsen úr Ørvi.

Í recurve bólkinum var lítil ivi um, hvør skuldi hava heiðurin.

Annika Vang hevur havt sera stóra framgongd í vetur og hevur vunnið nærum allar kappingar - bæði fyri tey yngru og tey vaksnu. Hon hevur sett 6 nýggj føroysk met, nevniliga 3 á 12 metrum, 1 á 15 metrum og 2 á 18 metrum fyri vaksnar kvinnur. Eisini hevur hon gjørt tað bragdið, sum eingin ungdómsskjútti nakrantíð hevur megnað - at vinna øll trý FM-heitini - 12 m og 15 m fyri ung og 18 m fyri vaksin.

Ársins skjútti í recurvebólkinum bleiv sostatt Annika Vang úr Ørvi.

Heiðursmerkir til allar FM-kappingarnar vóru latin av Statoilstøðini Saltangará.

Tá tikið verður saman um bogaskjótingina í vetur, hava serliga nógv ung verið við. Eisini hava tey ment seg nógv í skjótingini, tað sæst aftur í teimum nógvu personligu metunum - nevniliga íalt 74 persónlig met íroknað 7 føroysk met.



*Allir luttakararnir í FM kappingini í bogaskjóting á 15 metrum hjá teimum ungu*